| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 30. oktober 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 12/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2014 tann 30. oktober kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. oktober 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen
Petur Abrahamsen

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari
Magnus Midjord fór av fundinum kl. 18,30. Eingin kom á fund fyri hann.

## Mál nr. 36/2014
## Viðvíkjandi áheitan um eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn.

Vinnunevndin hevur á fundi tann 21. oktober 2014 staðfest, at fyritreytirnar viðvíkjandi íløgum í Fuglafjarðar havn eru munandi broyttar í sambandi við, at Pelagos hevur bygt stórt uppisjóvarvirki á havnarøkinum og neyðugt er at gera íløgur í økið rundan um virkið og Bergfrost.

Tí mælir vinnunevndin til, at kr. 1,1 mió. frá viðlíkahaldskontoini hjá Fuglafjarðar havn, rakstrarstað 07.38.15.530.10 konto 160001 verður flutt til Íløgur í havnina, rakstrarstað 07.38.15.531.10 konto 310001 til ávegis liðuggerð av økinum við Pelagos og Bergfrost.

Til viðlíkahald av Fuglafjarðar havn eru í fíggjarætlanini fyri 2014 avsettar kr. 1,8 mió. og brúktar eru higartil umleið kr. 600.000,00.

Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 22. oktober 2014, og tekur nevndin undir við áheitanini frá vinnunevndini um eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn. Mælt verður býráðnum til at veita eina eykajáttan til umflyting av kr. 1,1 mió. Frá rakstrarstaði 07.38.15.530.10 konto 160001 "umvælingav av havnini" til rakstrarstað 07.38.15.531.10 konto 310001 "íløgur í havnina", hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.
Talan verður sosattt bert um eina tekniska umflyting av rakstrarjáttan til íløgujáttan, sum ikki kostar kommunukassanum pening, grundað á at arbeiðið talan er um at gera kring virkini Pelagos og Bregfrost verður mett sum íløga í havnina og ikki umvælingar.
Staðfest er, at kr. 1,8 mió. eru avsettar á rakstrarstaði 07.38.15.530.10 á konto 160001: "Umvælingar av havnini", og við eini eykajáttan upp á kr. 1,1 mió. verður játtanin broytt til kr. 700.000,00. Hinvegin eru avsettar kr. 10,3 mió. á rakstrarstaði 07.38.14.531.10 konto 310001 og við eini umflyting við eykajáttan verður íløgujáttanin hækkað við kr. 1,1 mió. úr kr. 10,3 mió. upp í kr. 11,4 mió.
Ein eykajáttan, sum henda, førir ikki eina útreiðslu við sær, sum hevuir beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014 við tað at talan er um umflytingar frá rakstrarkonto til íløgukonto á øki 7 í fíggjarætlan kommununar.
Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

***Avgerð: Mál nr. 36***
Tilmælið frá vinnu- og fíggjarnevndini varð samtykt, við teirri viðmerking, at tekniska deild kannar eftir og ger upp, hvat er kommununar partur av økinum og hvat er partur hjá virkjunum á økinum. Soleiðis, varð málið beint til aðru viðgerðar á næsta býráðsfundi í nov. 2014. (9-0).

**Mál nr. 37/2014**
**Mál viðvíkjandi húsavarðatoymi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini til skipan av húsavarðatoymi saman við uppskoti til starvslýsing eftir trimum persónum til húsavarðatoymi aftrat verandi húsavørði.

Talan er um hesi størv:
**Starv 1:**
Persónurin kemur í starvinum at hava ábyrgdina av og umsjón við kommunalum skúlabygningum, eins og viðkomandi eisini kemur at

taka tær av viðlíkahaldsarbeiði, eftirliti við reingerðini, umsjón av svimjihøllini vm, hetta í tøttum samstarvi við skúlaleiðsluna og teknisku deild kommununar.

Somuleiðis skal viðkomandi arbeiða í húsavarðatoymi, sum kemur at umsita og viðlíkahalda allar kommunalar bygningar og ognir annars, og at hesin tessvegna kemur at verða starvsettur hjá Fuglafjarðar kommunu og ikki á ávísum stovni.

**Starv 2:**
Persónurin kemur í starvinum at hava ábyrgdina av og umsjón við størri kommunalum bygningum, eins og viðkomandi eisini kemur at taka tær av viðlíkahaldsarbeiði, eftirliti við reingerðini, vm, hetta í tøttum samstarvi við teknisku deild kommununar.

Somuleiðis kemur hesin arbeiða í húsavarðatoymi, sum kemur at umsita og viðlíkahalda allar kommunalar bygningar og ognir, og at viðkomandi tessvegna kemur at verða starvsettur hjá Fuglafjarðar kommunu og ikki á ávísum stovni.

**Starv 3:**
Persónurin kemur í starvinum at taka tær av viðlíkahaldsarbeiði av kommunalum bygningum og ognum annars, eins og viðkomandi eisini kemur at arbeiða í húsavarðatoymi saman við 3 húsavørðum.

Viðkomandi kemur at verða starvsettur hjá Fuglafjarðar kommunu og ikki á ávísum stovnum.

**Húsavarðatoymið** verður skipað undir leiðslu av teknisku deild kommununar.

**Førleikakrøv:** Umsøkjararnir skulu í minsta lagi hava útbúgving sum handverkari, duga væl at leggja arbeiðir til rættis, eins og teir skulu hava evni til at samskifta við tey, sum hava sítt dagliga arbeiði hjá kommununi.

**Krøv annars til størvini:**

- Umsøjkarar skulu hava koyrikort.
- Skulu luttaka í einum vaktartoymi
- Skulu um neyðugt kunna luttaka í øðrum kommunalum arbeiðum.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har viðkomandi sum húsavørðar fáa møguleika til at verða við í toyminum til at menna og betra um ognir kommununar.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF) og Starvsmannafelagið.

Fyrstu 3 mánaðar verða at rokna sum royndartíð.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundum í sosialu nevndini og teknisku nevndini ávikavist tann 20. og 21. oktober 2014 og taka nevndirnar einmælt undir við, at eitt húsavarðatoymi verður skipað við 4 starvssfólkum eftir tí leisti sum skotin er upp um avloysing eftir kl. 16.00 yrkadagar og vikusskiftisvaktum.

Sosiala nevndin er annars samd um, at tørvur er á eini húsavarðatænastu, tí kommunan eigur fleiri bygningar, sum mangla at verða hildnir viðlíka, og at fleiri bygningar eru komnir aftrat seinastu árini.

Persónar eiga at verða settir við ymsikum førleikum, so tær mongu uppgávurnar verða loystar á besta hátt.

Vinnunevndin hevur havt málið um húsavarðatoymi til viðgerðar á fundi tann 21. oktober 2014.

Nevndin heldur tað verða í so rívan at lýsa eftir 3 starvsfólkum aftrat Áku Petersen, umframt at teknisku deild verður áløgd eina uppgávu aftrat teimum, sum deildin frammanundan hevur.

Men orsaka av, at Áku Petersen einans hevur eitt ára starvstíð eftir, til hann fer frá vegna aldur, tekur vinnunevndin undir við at lýsa eftir 3 starvsfólkum til húsavarðatoymið.

Sum alternativ heldur vinnunevndin, at umhugsað eigur at verða, um húsavarðatænastan kann verða útveitt.

Mentamálanevndin viðgjørdi málið á fundi 21. oktober 2014 og kom við niðanfyri standandi viðmerkingum til málið:

1. Søknast verður eftir, at arbeiðið verður væl skipað, soleiðis at vit fáa eina góða byrjan upp á toymið og nágreiniligan skipan.
2. Eisini sóknast nevndin eftir eini stempulskipan fyri toymið og arbeiðsfólkið annars.
3. Nevdin heldur eisini, at ein av teimum 4 persónunum verður settur við ábyrgd á økinum, og kemur at hava beinleiðis samskifti við teknisku deildina.
4. Ynskiligt er, at tekniska deildin planleggur saman við ábyrgdarpersóninum í toyminum, t.d. hvønn mánamorgun,

hvørji arbeiði skulu gerast og ikki minst raðfesting av ymiskum arbeiðum, sum gerast skulu.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 22. oktober 2014 og mælir býráðnum til, at húsavarðatoymið verður stovnsett og at tikið verður undir við uppskotinum frá fyrisitingini til starvslýsing, tó við tí broyting, at talan fyribils verður um eitt húsavarðatoymi við trimum starvsfólkum, hetta sambært tilmælinum frá vinnunevndini.

Hinvegin mælir nevndin til, at spurningurin um møguliga 4. starvsfólkið til húsavarðatoymið verður tikið upp aftur til viðgerðar í seinasta lagi, tá ið Áku Petersen fer frá við eftirløn í oktober 2015.

***Avgerð: Mál nr. 37***
Tilmælið frá fyrisitingini og býráðsins nevndum varð samtykt soleiðis, at søkt verður eftir 3 fólkum til toymið. (9-0).

**Mál nr. 38/2014**
**Viðvíkjandi leigumáli fyri grótbrotið á Brúnarenda.**

Gjógvaráhagi hevur við skrivi, dagfestum 30. desember 2012 sagt leigumálið upp viðvíkjandi grótbrotinum á Brúnarenda, sum kommunan hevur havt við hagan síðan juni 1996 við einum mánaðarligum leigugjaldi upp á kr. 600,00, til at fara úr gildi til 01. apríl 2013.
Samskifti hevur verið partanna millum, og kravið frá Gjógvaráhaga var ein árlig leiga upp á kr. 70.000,00, og vildi vinnunevndin góðtaka eina árliga leigu upp á kr. 15.000,00.

Vísandi til fundarfrásøgn, sum formaðurin í vinnunevndini hevur havt við hagastýrið fyri Gjógvaráhaga, boðar hagastýrið frá, at tey vilja slaka úr kr. 70.000,00 til kr. 48.000,00 árliga ella kr. 4.000,00 um mánaðan.
Víddin á leigaða økinum er umleið 2.000 fermetrar, sum gevur eina árliga leigu upp á kr. 24,00 fyri fermeturin, og til samanberingar kann verða nevnt, at leigugjaldið á havnarøkinum er kr. 25,00 fyri fermeturin.
Vinnunevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 16. oktober 2014, og mælir nevndin býráðnum til, at leiguavtalan við Gjógvaráhaga verður endurnýggjað við einum mánaðarligum leigugjaldi upp á kr. 4.000,00 og við eini uppsagnartíð upp á 3 mánaðar frá báðum pørtum.
***Avgerð: Mál nr. 38***
Tilmælið frá vinnunevndini varð einmælt samtykt soleiðis, at leiguavtalan verður endurnýggjað við einum leigugjaldi upp á kr. 4.000 um mánaðin og við eini uppsagnartíð upp á 3 mánaðar frá báðum pørtum (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19,00

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Petur Abrahamsen

Skrivari:

Marin Sólheim Thomsen